# Lastbilur til sølu



**Merki: Nissan Eco-T v/krana**
**Árgangur 1997**
**Km. 70.000**
**6 tons totalvekt**
**Prísuppskot kr. 170.000,- v/MVG**

**P/F Meinhardt Arge**

# TIL SØLU
## NISSAN SERENA 2.3 DLX



*8 setur
*15" Alloy Sportsfelgur
*Eyka píkadekk
*Tónaðir rútir aftan
*Litur - vínreyður
*Árg. 11/1995

Innfluttur úr Skotlandi

David Findleton - Tvøroyri - Tlf.: 372110 - 215-210

**VEGG SAGING**
Hurðar,vindeygu, veggir, garðar o.a.

**HOL SAGING**
Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.

**GÓLV FRESING**

**GÓLV SLÍPING**

**GÓLV SAGING**
Rennir, keiøki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.

Nýggj tænasta til allar havnir í Føroyum.
Nú bora vit eisini hol í allar støddir av dekkum til fríhold.

**FØROYA BETONG SAGING** v/Hjaltur Tausen
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898

Sosialurin - 311820

# Havnar Bóltfelag

HB 1904

**Starvsfólk til kioskina í HB-húsinum**

Søkt verður eftir fólki at reka kioskina í HB-húsinum. Áhugað kunnu seta seg í samband við Jan Falkenberg Jensen á tlf. 219555 ella senda eina umsókn til HB, Gundadalur, 100 Tórshavn.

**Nevndin**

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Sjúkrasystrar/ radiografar og almanna- og heilsuatstøðingar

Søkt verður eftir sjúkrasystrum til avloysarastørv á Landssjúkrahúsinum í síni heild og almanna- og heilsuatstøðingum til psyk. økið komandi summar. Tíðarskeiðið er í høvuðsheitum frá 1. juni til 31. august. Talan er um fulltíðarstørv í skiftandi vaktum.

Deildirnar, sum tørva summarferiuavloysarar í ár, eru:

- dialysa
- anæstesi
- intensiv/cardiologi
- barnadeild
- føðideild
- operatiónsdeild
- psykiatriskar deildir
- geriatri/rehabiliteringsdeild
- røntgen
- ábyrgdarhavandi sjúkrasystir í dagvaktum í vikuskiftum, kvøld- og náttarvaktum (trissu-funktiónin)

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Marin Vang, sjúkrarøktarstjóra, tlf. 31 35 40, lokal 266, Cecilia Vestureið, yvirsjúkrasystir á Skurðdeildini, lokal 127, Ása Poulsen, yvirsjúkrasystir á Heili-ráðdeildini, lokal 300, Bergit Weihe, yvirsjúkrasyst-ir á Psyk.deildini, lokal 351, Ragna S. Reinert, deildarsjúkrasytir á Røntgendeildini, lokal 149 ella til Óluvá Lómstein, lokal 138, virkandi deildarsjúkrasystir á Anæstesideildini.

Løn- og setanartreytir samb. sáttmála millum av-varðandi yrkisfelag og Fíggjarmálastýrið.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum v.m. skal sendast til

**Almanna- og heilsumálastýrið**
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Umsóknarfreistin er 19. februar 2001 kl. 12,00.

# Sethús
## úti í Grønlandi í Havn
### Húsini standa í Krosslíð 9

Byggiár: 1967
Stødd: 70 m² í tveimum hæddum við innrættaðum kjallara.
Grundøki: 485 m²

til sølu um hóskandi boð fæst.

**Tlf. 312802**
eftir kl. 18

**TK Stovan**

**Tiltøk fyri vinnuna**

**Vitja www.tk.fo, har yvirlit er yvir tiltøk í Føroyum ætlað vinnuni, t.d. kunningar-fundir, skeið, framsýningar v.m.**

Til ber øllum at leggja tiltøk ókeypis inn á síðuna, og eisini at melda seg til einstøku tiltøkini.

**31 73 66**
**www.tk.fo**

**TK Stovan**
Niels Finsensgøta 37
FO-100 Tórshavn
**Fax** 319363
**www**.tk.fo

VILJI VITAN VØKSTUR

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**
**Skrásetingar-nr.** Sp/f 3118
**Navn:** Sp/f JPK Smíð
**Adressa:** 520 Leirvík
**Kommuna:** Leirvíkar Kommuna
**Stovningardato:** 01.01.2001
**Viðtøkudato:** 01.01.2001
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Stovnari:** Jógvan Páll Kannenberg, 520 Leirvík.
**Stjórn:** Jógvan Páll Kannenberg, 520 Leirvík.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjóranum.
**Grannskoðari:** : Sp/f Grannskoðarastovan á Skála, 480 Skála.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:** 01.01.2001 - 31.12.2001
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka handil, handverk, o.a. í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 25. januar 2001

Kristin Balle

# Stuðulsfólk

Søkt verður eftir tveimum stuðulspedagogum/ hjálparum fyri fólk í barnsburðarfarloyvi til Dr. Margrethu barnagarð í Klaksvík.

Arbeiðið hjá stuðlinum verður at stimbra børnini málsliga, motoriskt og sosialt.

Arbeiðið verður gjørt í samstarvi við familjuna og barnaverndina.

Arbeiðstíðin er 30 tímar um vikuna frá 15.02.01 til 01.10.01.

Ynskiligt er, at tann, ið settur verður, hevur hóskandi fakliga útbúgving ella royndir.

Setan sambært sáttmála millum Føroya Pedagog-felag og Fíggjarmálastýrið.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Irenu Olsen á tlf. 456388.

Umsóknir saman við møguligum avritum av prógvi verða at senda til:

**Barnaverndarnevndina**
Klaksvíkar Kommuna
Postboks 2
700 Klaksvík

í seinasta lagi tann 07. februar 2001.



# DAGFØR TEG HALT SOSIALIN

Tekna teg sum haldara nú, so fært tú Sosialin **ókeypis** restina av hesum ársfjórðinginum

Sosialurin

Tekna teg sum haldara, so fært tú sosialin 5 ferðir um vikuna til dyrnar

Tíðindablaðið
**sosialurin**
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*
Restina av hesum ársfjórðingi fái eg Sosialin *ókeypis!*

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur:
Tlf.:
Undirskrift:

☐ Haldarar í Føroyum: 360,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 510,-/ársfj.
☐ 5 bløð einaferð um vikuna í Europa: 425,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ Internet: 240,-/ársfj.

Sosialurin

**Mentamálastýrið**
*Mentamáladeildin*

Mentamálastýrið letur árliga stuðul til ymisk tiltøk og verkætlanir. Við hesum verður lýst leyst at søkja um stuðul av niðanfyri nevndu stuðulsmøguleikum.

## Stuðul til mentanarlig tiltøk

Á fíggjarløgtingslógini er peningur settur av til stuðul til ymisk mentanarlig og listarlig tiltøk innan myndlist, tónlist og leiklist, eitt nú framsýningar, konsertir, framførslur og mentanarligar verkætlanir og tiltøk innan sum uttanlanda.

Játtanin er ætlað at birta upp undir og stuðla einum virknum og mennandi mentanarlívi á bygd og í býi, at flyta fram og gera føroyska mentan og list sjónligari innan- og uttanlanda, og at geva stuðul til føroyskar verkætlanir, ið lutvíst verða fíggjaðar við stuðli frá Norðurlendska Ráðharrastovninum, Norðurlendska Mentanargrunninum ella stovnum og nevndum undir Norðurlendska Ráðharrastovninum. Játtanin er eisini ætlað at menna mentanarsamstarv í Útnorði. Stuðul kann eisini veitast einstaklingum til nýskapandi listarlig ella mentanarlig tiltøk, verkætlanarfyrireiking og annað listarligt virksemi.

Tey, ið skipa fyri tiltøkum og standa fyri verkætlanum, sum fella innanfyri hesi eyðkenni, eru vælkomin at søkja.

## Studningur til eftirútbúgving av myndlistafólki

Á fíggjarløgtingslógini 2001 er peningur játtaður til studning til eftirútbúgving av myndlistafólki.

Tey, ið ætla sær uttanlands í eftirútbúgvingarørindum, eru vælkomin at søkja.

## Stuðul til barna- og ungdómsarbeiði

Tann upphædd, ið Mentamálastýrið umvegis sp/f Ítróttarvedding fær burturav veddingarpeninginum, verður at nýta til verkætlanir og tiltøk til gagns fyri børn og ung.

Tey, ið skipa fyri tiltøkum og standa fyri verkætlanum, sum eru børnum ella ungum til gagns, eru vælkomin at søkja.

## Stuðul til framleiðslu av føroyskum loftmiðlatilfari

Á fíggjarløgtingslógini 2001 eru kr. 1.000.000 játtaðar til framleiðslu av føroyskum loftmiðlatilfari.

Tey, ið arbeiða við ella ætla at fara undir at framleiða føroyskt loftmiðlatilfar, eru vælkomin at søkja.

## Stuðul til Orðabókagerð

Á fíggjarløgtingslógini 2001 eru kr. 1.400.000 játtaðar til orðabókagerð. Endamálið við játtanini er at stuðla orðabókagerð úr og í fremmant mál.

Tey, ið arbeiða við ella ætla at fara undir at gera tílíkar orðabøkur, eru vælkomin at søkja.

Allar umsóknir eiga at verða skrivaðar á serstakt umsóknarblað til endamálið. Umsóknarbløð og vegleiðingar eru at finna á internetinum á: *www.mms.fo*, ella fáast við at venda sær til:

**Mentamálastýrið**
**Postrúm 3279 – 110 Tórshavn**
**Telefon 35 50 50 – Telefax 35 50 55**
**e-postur.: umms@umms.fo**

Umsóknirnar skulu verða Mentamálastýrinum í hendi innan **hósdagin 1. mars 2001**. Tey, ið ynskja at vita meira um stuðulin, eru vælkomin at venda sær til Mentamálastýrið á telefon 355050.

# Skrivari

søkist til Elduvíkar Kommunu.

Meira fæst at vita við at ringja á tlf. 441553.

Skrivlig umsókn skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi 21.02.01.

**Elduvíkar Kommuna**
att.: Johan Hansen
477 Funningsfjørður

# Føroya Astma/ Allergifelag

Aðalfundur felagsins verður leygardagin 10. februar klokkan 14.00 í MBF-húsinum. Uppskot til aðalfundin skal vera nevndini í hendi eina viku áðrenn aðalfundin.

Við á fundinum verður Petur Ellefsen, næsa-oyru og hálslækni.

**Nevndin**



**ADC-Heilsølan**
*Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893*

**ARBEIÐSHANDSKAR**
*Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi*

**LANDSINS STØRSTA ÚRVAL**
*frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar*

ADC

**BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA**

veitst tú ikki tað?

Sosialurin